## HEILSANIR



**Góða, elskaða Marjun**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 20. januar. Jesus pápi signi framtíð tína ynskja
**Sonja omma og Óli abbi**



**Góða Anna Randi**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum 13.01.2002 ynskja mamma & Regin
**Mussar og klemm**



**Góði Aleksandur**
Hjartaliga tillukku á 1 ára føðingardegnum tann 17. jan. ynskir
**mamma**


Leiðarastarv

# Roknskaparleiðari

Søkt verður eftir leiðara til roknskapardeildina á Strandfaraskipum Landsins.

**Uppgávur hjá roknskapardeildini**
Høvuðsuppgávan hjá roknskapardeildini er at veita eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna búskaparstýringina. Aðrar uppgávur eru:
- Fyriskipan av roknskaparverkinum
- Rakstrar-, íløgu- og likviditetsætlan, herundir langtíðarætlanir
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga, mánaðar- og ársroknskapir, herundir budgeteftirlit og játtanarroknskapir.

**Uppgávur hjá leiðaranum**
Høvuðsuppgávurnar hjá roknskaparleiðaranum verða:
- Ráðlegging, fyriskipan, raðfesting, samskipan og eftirlit í sambandi við búskaparstýringina
- Seta upp fíggjarætlanina við atliti til:
  - avmarking og útdelegering av avgerðarábyrgd
  - samskifti og samskipan millum stjóra og deildarleiðarar
  - motivatión fyri at røkka tilætlað úrslit
- Framløga av standard- og specialrapportum
- Menna innanhýsis mannagongdir í sambandi við gerð av fíggjarætlan, roknskapi o.ø.
- Fyriskipa upplæring, undirvísing og fakliga menning av starvsfólkunum á deildini
- Uppgávu- og starvslýsingar á deildini.

Í løtuni verður arbeitt við at umleggja búskaparskipanina hjá SL. Henda uppgáva verður ein spennandi avbjóðing fyri komandi roknskaparleiðaran, sum fær ein týðandi leiklut og ábyrgd fyri verkætlanini.

Eisini verður ætlaða byggingin av suðuroyarferjuni ein spennandi avbjóðing fyri roknskaparleiðaran.

**Førleikakrøv**
- Vinnu- og handilsútbúgving frá hægri lærustovni ella líknandi
- Royndir innan edv á høgum brúkarastøði
- Royndir innan fíggjarstýringarskipanir, so sum Navision Financials
- Royndir í projektleiðslu ein fyrimunur
- Málrættaður og arbeiðir analytiskt
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt leiðarastarv við stórum og spennandi avbjóðingum, har leiðarin fær ábyrgdina av at umsita og menna eina týdningarmiklað funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært avtalu, og er lønt í 36. lønarflokki sambært tænastumannalógini, tó uttan at starvið er tænastumannastarv. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 4. februar 2002. Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður, kann byrja skjótast gjørligt.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Reidar Nónfjall, stjóra.
Tlf. 34 30 00 ella e-postur: ren@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS




Øllum tykkum, sum við gávum, fjarritum og heilsanum mintust meg á fermingardegnum 7. oktober, takki eg hjartaliga. Eisini allar tit, sum gjørdu mat og hjálptu til, fáa eina heilsan. Gott nýggjár ynskja vit øll.
**Høgni**



**Góðu Jacklin og Sigfríður**
Hjartaliga tillukku við degnum 21. januar. Her eru tit fitt.
**Heilsan, omma í Klaksvík**



**Hey, Brian og Simona**
Hjartaliga tillukku við 5 og 2 ára døgunum 20. jan. ynskja
**mamma og babba**



## TILTØK

## FØÐINGAR

7. desember fingu Heidi og Brian Rytoft Jensen, Næsbjerg, Varde, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4150 gr.

8. januar fingu Helen Dam og Poul Augustinussen, Vágur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4200 gr.

9. januar fingu Frida Mellemgaard og Jens Kristian Hansen, Havn, eina dóttur. Hon var 58 cm. long og vigaði 4500 gr.

9. januar fingu Conny Utvær og Høgni Marsten, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3560 gr.

10. januar fingu Hertha og Marni Eliasen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3700 gr.

11. januar fingu Agnes Davidsen og Suni McIntosh, Hoyvík, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3300 gr.

13. januar fingu Annika og Leif Høj, Saltangará, ein son, ið eitur Áron, Hann var 54 cm. langur og vigaði 4010 gr.

14. januar fingu Johild og Bergur Johannesen, Signabø, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3600 gr.

15. januar fingu Jenni Hattarstein og Allan Eldevig, Miðvágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3550 gr.

15. januar fingu Anita Wilhelmsen og Høgni Johansen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 44 cm. long og vigaði 1525 gr.

16. januar fingu Katrin og Jóhan Edvard Fuglø, Leirvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3000 gr.

16. januar fingu Ketty í Brekkunum og Jóan Petur Andreasen, Hvalvík, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og vigaði 4200 gr.

16. januar fingu Andrea og Kjeld Gaard-Frederiksen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3620 gr.

17. januar fingu Turid og Birgir Bærentsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3110 gr.

## ANDLÁT

**11. januar**
Anna Hvidtfelt Rasmussen, ættað av Sandi, búsitandi í Havn, 86 ár.

**12. januar**
Herborg Jacobsen, ættað úr Sørvági, búsitandi í Køge, 85 ár.

**13. januar**
Mona Lydersen, fødd Højgaard, ættað úr Rituvík, búsitandi í Klaksvík, 82 ár.
Sanna Mortensen, vanliga nevnd Sanna hjá Bassanum, úr Vági, 91 ár.

**15. januar**
Meinhard Højgaard, fyrrverandi tollari, Saltangará, vanliga nevndur Meinhard hjá Palla, 80 ár.
Johan Wang Niclasen, Hestur, 70 ár.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 19. jan.: Sverri Lamhauge, tlf. 448016
Sunnudagin 20. jan.: Sverri Lamhauge, tlf. 448016

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

**Gudstænastur**
**2. sunnudag e. trettanda**
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Nólsoy:* kl. 12, Sonja Klein
*Leiti:* kl. 12, altarg.,
*Hov:* kl. 15, altarg., Marianne Telling
*Sjóvar kirkja:* kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Miðvágur:* kl. 12, altarg., David Johannesen
*Viðareiði:* kl. 12, altarg., Elsa Funding
*Tvøroyri:* kl. 11, Jónsvein Bech
*Søldarfjørður:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Fuglafjørður:* kl. 12, altarg., Uni Næs
*Kollafjørður:* kl. 12, M. Bæk
*Vestmanna:* kl. 12, altarg., I. P. Dam
*Eiði:* kl. 11.40, skriftarmál, kl. 12, messa
*Norðskála:* kl. 17, messa (kirkjan 70 ár, kirjusangarar í Glyvra kirkju syngja – samvera við drekkamunni aftaná). Emil Olsen
*Hellur:* kl. 12, John Myllhamar
*Christianskirkjan:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen
*Húsar:* kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.

**»Tíð til Gud«**
verður úti í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21. Drekkamuður aftaná. Verið hjartaliga vælkomin.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsinstænasta í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Orðsinstænasta við kommunión í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin kl. 14. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti har Poul Jóhan Djurhuus, Jógvan Páll Sevdal og Páll á Lakjuni tala, kl. 21 Útimøti.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, Malan, Heri og børnini vera við, kl. 18 YM-møti v/ Hera Kjærbo, barnaansing verður.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Rhema á Hálsi**
Bønarmøti verður mána-, týs- og mikukvøldið kl. 20.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids.
**Fundarøðin við Jens Garnfeldt:** Fríggjakvøldið kl. 20 Møti.
Leygarmorgunin kl. 10-12 Opið leiðaraseminar (øll við eini ella aðrari ábyrgd í samkomuni kunnu møta). Kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 11 og 18 Møti. Sunnudagsskúlin er kl. 11. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti, har Jónfinn Olsen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Sverra Steinhólm presti. Evni: 2. Kongabók.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Símun Absalonsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Sonna Djurhuus.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Vestmanna Missiónshús**
Missiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 20 við talu og sangi av Meinigheitskórinum í Havn.
Sunnudagin er gudstænasta við altargongd kl. 12, sunnudagsskúli kl. 14.30 og møti kl. 18 við talu og sangi av Meinigheitskórinum íHavn. Innsavnan. Bønarløta er 1/2 tíma undan møtunum.

**Kedron, Sørvágur**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 16 verður sangmøti í Zarepta á Vatnsoyrum við Ebenezer kórinum. Vanliga møti kl. 18 er tí avlýst.

**Mizpa, Eiði**
Møtirøð verður í Mizpa í vikuskiftinum. Fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Talarar: Høgni Johannesen og Janus Gunnarsson. Eisini verður sangluttøka við: Allan Ellingsgaard, Kristjan og Kára. Øll eru vælkomin.

**Avhaldshúsið í Vík**
Evangeliskt møti verður í Avhaldshúsinum í Vík leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 19. Herman og Gigga syngja.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20. Karl Joensen luttekur. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sjómanskvinnuringurin hevur pakkafest mánakvøldið kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Ungdsómsráðstevna í bygdarhúsinum á Strondum. Hesi tiltøk eru almenn:
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti v/ Jan Honningdal og Magnus Persson. Kl. 22.30 Praise explosion við Liquid Gravity og Eyðun Jacobsen.
Leygarkvøldið kl. 19 Møti v/ Magnus Persson o.fl. Kl. 22.30 Praise explosion v/ Jan Honningdal o.fl.
Sunnudagin møti í Kelduni kl. 17 v/ Paula Høj og Jan Honningdal.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við evninum: Umsorgan. Øll eru vælkomin.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Kitty Johannesen og Juliannu Bech v.fl.
Mánadagin kl. 17 møta Liljurnar. Øll eru vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Jóhann Petur Jóhannesen talar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Norðoyggjar**
Vikuskiftismøti í missiónshúsinum á Viðareiði.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 talar Absalon Matras, Óli Poulsen syngur.
Leygarkvøldið kl. 19.30 talar Pól Johannesen, BIS.CO syngur.
Sunnukvøldið kl. 18 talar Regin Høgnesen.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Lovsangs- og bønarmøti, kl. 18 Møti.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Ragnar og Jeannu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Café One Way, Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 verður filmurin »Korset og springkniven« vístur. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Týsdagin kl. 15.30 verður barnahugni.
Tórsdagin kl. 19.15 venur Dansibólkurin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Ein spitalskur maður segði við Jesus: »Harri, um tú vilt, so kanst tú gera meg reinan« …Og ein herhøvdingi segði við hann· »Harri, eg eri ikki verdur, at tú kemur á gátt hjá mær, men sig tað bert við einum orði, so verður drongur mín frískur«*

*Matteus 8,2 og 8*

Trúgv er mangan at finna har, ið vit minst vænta hana. Jesus kemur oman av fjallinum, og í ferðini við honum er stór mannfjøld. Tá er tað, at hann møtir einum spitalskum manni og herhøvdinganum. Tann, ið var spitalskur, varð rikin út úr bygdini og mátti liva í einsemi burtur frá sínum kæru og øðrum fólki. Mong sóu eisini hesa sjúku sum eitt sjónligt tekin um Guðs vreiði og revsing. Við herhøvdinganum var øðrvísi. Hann sær út til at hava havt eina ávísa virðing millum fólkið. Tí hjá Lukasi lesa vit, at teir elstu millum jødanna siga við Jesus: »Hann er tess væl verdur, at tú gert hetta fyri hann; tí at hann elskar fólk okkara, og samkomuhúsið hevur hann bygt okkum«.

Kortini var hann rómverskur hermaður og heidningur. Hin spitalski og herhøvdingin eru lítillætnir og eyðmjukir, tá ið teir trína fram fyri Jesus. Hin spitalski fellur á knæ fyri honum og sigur: »Harri, um tú vilt, so kanst tú gera meg reinan«. »Um tú vilt«. Tað er sum um at hann vil siga: »Eg havi ikki uppiborið vælvild tína. Tó, vík ikki frá mær, men hjálp mær«. Herhøvdingin vísir eisini lítillæti og eyðmýkt. Hann hugsar einki um góðgerðir sína ímóti fólkinum, ella um samkomuhúsið, sum hann lat byggja. Nei, hann kennir seg sum ein heidning, ið einki kann krevja, og tí sigur hann: »Harri, eg eri ikki verdur, at tú kemur á gátt hjá mær«.

Bæði hin spitalski maðurin og herhøvdingin hava treytaleyst álit á Jesusi. Hin spitalski sigur: »Harri, um tú vilt, so kanst tú gera meg reinan«. Við hesum ásannar hann Jesu guddómleika, og at Jesus kann gera, sum hann vil. Herhøvdingin fær høvi til enn týðiligari at játta trúgv sína og at vísa Jesusi álit.

Hann sigur. »Sig tað bert við einum orði, so verður drongur mín frískur«. Av egnum royndum visti hann, hvønn týdning tað hevði at geva boð og at vera lýðin. Og tað sama valdið, sum hann hevði í sínum lítla umhvørvi, vildi hann siga, at Jesus hevði á teimum fjaldu kreftunum, sum fremja Guðs vilja á fold. Og báðum var, sum teir trúðu.

Nú skulu vit ikki máta trúnna hjá hvør øðrum, hvør ið hevur eina veika trúgv, og hvør ið hevur eina sterka trúgv og vit eru heldur ikki før fyri tí, sum sagt varð í innganginum, at trúgvin er mangan at finna har, vit minst vænta hana. Tað, sum er avgerandi, er at vit trúgva á Jesus, eisini um bønarsvarið ikki altíð var eftir okkara vilja.

**Emil Olsen, prestur**